# Miðvikan

Kristian Djurhuus:

# Lívshættisligt at fara eftir torvi

**Tey ungu í dag vita nóg illa, hvat ið torv er. Tey skilja í hvussu er ikki knossið, sum var at útvega brennievni til hita og matgerð. Ta einu ferðina mundi Kristian doyð úti, tá ið farið varð eftir torvi. Men fyrst greiðir hann frá vetrarítrótti í Havn**

**12. partur**

Í mínum ungu døgum íðkaðu vit eisini vetrarítrótt. Hetta skapti nakað av órógv í býnum. Men onkustaðni skuldi ungdómurin sleppa at útfolda seg. Men so gav løgreglan okkum loyvi til at nýta Tórsgøtu, sum var longsta brekkan í Havn. Tað var eingin trupulleiki við koyrandi ferðslu, tí bilar vóru als ikki til.

Eg hevði eisini gjørt mær eina sletu, har eg kundi gera meg upp fyri Margrethu. Eg bjóðaði henni og hennara vinkonum túr á sletuna. Tær fingu strong boð um at hava føturnar upp frá á ferðini. Men hetta endaði eina ferð galið. Margretha kom at bróta eitt bein í fótinum, so hon mátti liggja í seingini í nakrar vikur. Hetta var áðrenn, vit vórðu trúlovað, so eg óttaðist fyri, at nú fór speril at koma í. Men ikki bilaði!



*Tað lá væl fyri at skreiða í Tórsgøtu*



*Ein krógv. Mynd Peter J. Sigvardsen*

### Landbúnaðurin

Umframt mítt skrivstovuarbeiði mátti eg eisini hjálpa pápa við landbúnaðinum, sum gav eitt gott ískoyti til handverkaraløninа hjá honum. Hetta gav okkum eisini mjólk, kjøt og eplir.

Umframt var tað torvskurðarættindi, sum gav okkum nóg mikið av brenni. Vit kundu skera torv á fimm ymiskum heiðum. Hetta tók sína tíð. Til torvheiðarnar, sum vóru longst burtur, tók tað tveir tímar til gongu aftur og fram. Hagar tað var stytst, tók tað ein tíma.

Her kann skoytast uppí, at Andreas Ziska í bók síni »Tórshavn – lív og vøkstur« greiðir frá, at hin 14. august 1833 varð ásett, at fútin skuldi hava umsjón við torvheiðarnar og skuldi útnevna tveir menn at samanleggja heiðarnar kring Tórshavn. Í 1837 var torvheiðasamanleggingin at enda komin, og vóru heiðarnir lutaðir til 163 húski, sum tá vóru í Havn. Men framvegis vóru nógv hús, sum høvdu fleiri torvheiðar, sum Kristian Djurhuus eisini greiðir frá.

Nøgdin, ið kundi skerast av torvi, var gjørd upp í klyvjum. Ein klyv er tveir leypar, tv.s. rossabyrðu, ein leypur hvørju megin rossið.

Talið av klyvjum var sera ymiskt. Tað var frá góðum 100 til fleiri hundrað klyvjar fyri hvørt húsarhaldið.

Í 1833 verður eisini avrátt at byggja ein torvveg, sum kom at verða kallaður Landavegur.

Mangir vóru menninir og mong vóru fótasporini hjá teimum, ið knossaðu leypar í kavaroki, stormi, regni og góðveðri hesi ár, mann eftir mann, á Landavegnum. Undir hvíling við Skeivutræbrúgv og Bøkkinum, vóru mong tíðindi og mong hugskot á munni manna millum. Tá ið bilar komu lætti tað eisini nógv um at kunna koyra torvið heim.

### Torvheiðarnir skuldu røkjast

Kristian heldur áfram:

Tað vóru serligar reglur um, at tað skuldi farast vandaliga um torvheiðarnar. Um hetta ikki hendi, kundu myndugleikarnir koma uppí við bót ella dagbøtur, til skil var komið á.

Tað var hildið at vera ein stór skomm at fáa bót fyri ikki at fara væl um torvheiðarnar.

Torvið var í fyrsta umfari koyrt í krónna og varð, sum tørvurin var, borin heim í leypi. Leypurin skuldi fyllast á ein serligan hátt fyri at lætta um byrðina. Vektin skuldi vera nøkulunda tann sama omanfyri sum niðanfyri fetilin, so javnvág var í tyngdini. Tað sama var við hoyggi.

Vit skóru sum sagt torv á fimm ymiskum heiðum. Á fýra teirra gingu vit omanbrekku til húsa við fyltum leypum. Hetta lætti sjálvsagt um. Frá tí fimta heiðinum var tað sera óslætt, og tí var tað sera strævið at ganga.

Vit nýttu umleið ein leyp av torvi um dagin um veturin og eitt sindur minni, tá ið veðrið var meira lýtt.

Tá tað snúði seg um torvarbeiði vóru øll líka nógv um arbeiðið. Tó var tað mansarbeiði at skera torvið, tó við hjálp av teimum ungu dreingjunum.

Í mínum seinnu dreingjaárum fingu vit ein part av torvinum flutt heim við hestavogni, har tað var møguligt hjá vogni at koma framat við honum.

Heima máttu vit eisini hava eina eykagoymslu, tí ringt veður ella sjúka kundi jú forða fyri, at farast kundi eftir torvi.

Pápi plagdi ofta at fara eftir torvi vetrarkvøld í mánalýsi, tá ið tað var møguligt at finna vegin.

Sjálvur plagdi eg at fara eftir torvi áðrenn skrivstovutíð. Eg plagdi at fara avstað um seks tíðina og var heima so tíðliga, at eg kundi skifta, vaska mær og fáa mær morgunmat, áðrenn eg skuldi møta til arbeiðis kl. 9.

### Effektiv orkusparing

Tað var ofta kegl millum tey, sum nýttu torvið, og tey sum høvdu stríðið av at fáa tað heim.

Ein skipari á Tvøroyri greiddi hetta á ein serligan hátt, tá ið hann helt, at konan hevði nýtt ríkiliga nógv av torvi.

Tá setti hann seg á torvkassan at gera okkurt seglmakaraarbeiði. Hann bleiv sitandi so leingi, sum tað passaði honum, uttan mun til hvussu konan kundi leika í.

Hjá teimum mundi tað vera sum hjá so mongum. Maðurin var skipari og var vanur at kommandera umborð. Men heima vildi konan sleppa at ráða.

Tá eg var drongur, vóru tað bert tey fæstu og tey mest vælhavandi, sum brúktu kol. Tað kundi tó henda seg, at mamma fekk pápa at keypa eina spann av koli, tá ið tað var okkurt, sum skuldi bakast, og sum skuldi hava nógvan hita. Tá plagdi eg at verða sendur við kolspann at keypa kol.

Tá ið eg fór eftir torvi plagdi eg við hvørt at hitta býráðsskrivaran Vilhelm Mohr, beiggja Jens Mohr

Vilhelm var ikki heilt sum fólk flest. Hann var tá um 70 ára gamal. Men honum dámdi ikki, at teir yngru vóru skjótari til beins enn hann. Ein morgun, eg var í seinna lagi og skundaði mær, gekk eg fram við Vilhelm í Vágsbotni, hann var eisini á veg eftir torvi. Hann rópti eftir mær, hvat eg billaði mær inn at kappast við hann at ganga. Hann skuldi eisini vera maður at kappast. Vilhelm setti so ferðina upp, men

*Í komandi parti verður meira greitt frá pápanum Dia í Ólastovu. Hann var millum annað við til at byggja fyrsta vitan í Føroyum*